# ULIG...





MYND: JENS KRISTIAN VANG

*Heðin Jacobsen, er skurðlækni og serfrøðingur innan gastriskt bypass.*

noydd, at aftur leggja seg á skurðborðið at skera húðina burtur á búki, lørum og ørmum. Hetta er ikki ókeypis at gera, og vanliga rindar heilsuverkið ikki fyri plastikkskurðviðgerðir av hesum slag.

Fleiri av teimum, sum vóru við í svensku sjónvarpssendingini, søgdu frá um eksem og ringan lukt frá eykahúðini. Summi kundu ikki íðka nakran ítrótt, tí húðin skavar.

– Umleið helvtin av teimum, sum verða skurðviðgjørd, hava brúk fyri, ella ynskja, plastikkkirurgi. Hetta kann antin gerast á almennum sjúkrahúsum, har kapasiteturin ofta ikki er nøktandi, ella á privatum sjúkrahúsum, sigur Heðin Jacobsen

Tað, sum hevur verið nógv frammi í miðlunum er, at eftirviðgerðin av hesum sjúklingum er ikki nøktandi, og tí fáa tey trupulleikar seinni í lívinum. Eisini hesum vísir Heðin Jacobsen aftur.

– Okkara toymi av skurðlæknum hevur stórar royndir og er eitt av teimum toymunum, sum gera flestar skurðviðgerðir. Í fjør gjørdu vit um 3.000 skurðviðgerðir í Noregi, Danmark og Svøríki. Serliga í Noregi, har vit sjálvir taka okkum av allari eftirviðgerð, hava vit drúgvar royndir við teimum trupulleikum, sum kunnu stinga seg upp eftir skurðviðgerðina.

Føroyingar, ið fáa skurðviðgerð á Aleris, verða kannaðir har og í Føroyum.

– Blóðroyndir verða tiknar árliga, hetta kann gerast í Føroyum. Síðan verða svarini send okkum og vit geva viðkomandi ráð og vegleiðing, hvat tey skulu taka av ískoyti. Um aðrir trupulleikar stinga seg upp, verður hetta eisini viðgjørt. Umframt rutinukontroll hava tey, sum eru skurðviðgjørd her, møguleika at kontakta okkum nær sum helst fyri at fáa ráð og viðgerð. Eisini um talan er um kirurgiska eftirviðgerð, har vit kunnu rætta uppá ting. Prísirnir fyri hetta eru ymiskir alt eftir, hvussu nógv sum skal gerast, sigur Heðin Jacobsen.

Hann leggur tó aftrat, at gastriskt bypass er ein heilsuoperation og ikki kosmetikk. Tí eiga tey, sum umhugsa at gera hesa viðgerð, eisini at hugsa um at nýggjur lívsháttur er neyðugur, har fysiskur aktivitetur og góðir matvanar er týdningarmikið.



*Eykahúðin, sum verður eftir á kroppinum eftir skurðviðgerðina, kann ofta verða til ampa.*